# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 30. desember 2009


## Toppskjúttin verður í Sarpugerði



### Sum skilst fer Finnur Justinussen ongan veg til Svøríkis á hesum sinni

Tað hevur annars ljóðað, at Finnur Justinussen, sum í fjør gjørdist bæði toppskjútti og stjørnuskot í føroiyskum fótbólti, skuldi fara til svenska Gefle IF at spæla.

Handilin er tó ikki veruleiki enn, og sum skilst úr Gøtu, so verður hann tað heldur ikki á hesum sinni.

Hartil ljóðar eisini úr Sarpugerði, at Bárður Hansen, sum hevur verið ávegis til Danmarkar, heldur ikki fer nakran veg, so tað bendir tann vegin, at talan í størst møguligan mun verður um ein óbroyttan hóp, sum í 2010 skal verja heitið sum føroyskur steypavinnari.

## Met-mál tryggjaði sigurin

Fernando Torres gjørdist í gjárkvøldið tann spælarin, sum upp á stytst tíð hevur skotið 50 mál fyri Liverpool. Hetta hendi, tá hann í gjárkvøldið við einum máli í yvirtíðini tryggjaði Liverpool ein serstakliga kærkomnan 1-0 sigur á útivølli móti Aston Villa.

Sigurin ber við sær, at Liverpool nú bert er trý stig frá Tottenham, sum í løtuni situr á fjórða-plássinum, sum gevur atgongd til Champions League.

Í hinum dystinum í gjárkvøldið spældu Bolton og Hull javnleik, 2-2.

-mørk



Pál Joensen hevur vunnið heiðurin sum ársins føroyska ítróttarnavn tey bæði seinastu árini. Og lítil ivi er um, at hann er stórfavorittur til heitið aftur í ár

# Ársins ítróttaravrik kosið í morgin

**Nýggjársaftan verður stór ítróttarkavalkada í Sjónvarpinum. Og sum rómin til lagkøkuna verður ársins ítróttanavn kosið**




jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk


Pál Joensen, U21-landsliðið í fótbólti, Joan Bláfoss, svimjilandsliðið á Oyggjaleikum og altjóða hondbóltsdómaraparið, Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen.

Tað eru tey fimm nøvnini, sum í ár kappast um heiðurin at vinna heitið sum ársins navn í føroyskum ítrótti í 2009.

Vinnarin av hesum verður kosin í serligu ítróttakavalkaduni, sum verður send í Sjónvarpinum hjá Kringvarpinum klokkan 16.30 nýggjársaftan.

Tað eru teir fýra, Suni Merkistein, Ragnar C. Joensen, Kaj Joensen og Tórður Mikkelsen, sum standa fyri sendingini, har tikið verður samanum ítróttarárið, sum nú fer aftur um bak. Framleiðari er Bjarnheiðin í Hoyvík.

Tað er eitt panel við ítróttarkønum fólki, sum hevur valt teir fimm finalistirnar, og seinastu vikurnar hevur atkvøðugreiðsla so verið á heimasíðuni hjá Kringvarpinum.

# Nýggjársduathlon verður hósdagin

**Nýggjársaftan klokkan 10 skipa Tórshavnar Súkklufelag og Føroya Triathlonfelag fyri kapping í Duathlon**


DUATHLON

*Tíðindaskriv*

*post@sosialurin.fo*


Kappast verður á gøtunum millum Hotel Føroyar og fjósini í Havnardali.

Hesa ferð verður fyrst runnið, síðan súkklað og so skulu íðkararnir aftur í renniskógvarnar og renna teir seinastu tríggjar kilometrarnar.

Runnið verður fyrst tríggjar kilometrar. Síðani verða 12 kilometrar súkklaðir, áðrenn tríggir afturat skulu rennast.

Tað verður aftur í ár eisini skipað fyri einari MTB-kapping. Tey, ið ikki ynskja at kappast í Duathlon, hava møguleika at kappast á fjallasúkklu. Súkklað verður sama tein sum í Duathlon, men súkklararnir skulu súkkla seks umfør – altso umleið 18 km.

Møtt veðrur klokkan 9.30 við ríðibreytina í Marknagili, og fer tilmelding fram á staðnum.



Súkkling og renning er á skránni nýggjársaftan, tá bæði duathlon og fjallasúkkling er á kappingarskránni við Marknagil